# 59 mió LEGO-brikkar á einum staði

**LEGOLAND** er mest kenda og elskaða stuttleikaparkin í Danmark. Her hava børn og vaksin møguleika fyri action, ferð og stuttleika í so stórum tali, at spurningurin er, um ein kann røkka øllum eftir bert einum degi.

At LEGOLAND er vorðið so væl umtókt kemur ikki av ongum, tí her kunnu tey spælisjúku lata fantasi'in ráða á landi, við vatni og í luftini.

Soleiðis hevur tað verið síðani 1968, tá LEGOLAND lat dyrnar upp á fyrsta sinni. Og líkt er til, at fleiri og fleiri leggja leiðina higar.

Tað er serliga Mini-landið sum flestu fólk vitja. Orsøkin til hetta er helst hin einfalda, at hetta er hjartað og fyrsta staðið sum tey vitjandi koma til.

Her eru gjørd í hópatali av modellum av kendum bygningum og støðum kring allan heimin, m.a. úr USA, Skotlandi, Japan og Grikkalandi og sum øll eru gjørd í lutfallinum 1:20.

Av kendum støðum í Danmark kann ein nevna Amalienborg, Dybbøl Mølle, Ribe og Klampenborg Station.

## X-factor

Tey vitjandi hava eisini møguleika at vitja og royna ymiskt sum júst hóskar til aldursbólkin hjá børnunum. Og um ein troyttur av egnum upplivingum, ber til at fara til ymiskar framførslur.

Ein slík framførsla verður leygardagin í næstu viku, tá kendur X-factor fólkini Sarah, Babou og Annelouise fara at syngja.

Við øllum hesum tiltøkunum og teimum 59 mió lego-brikkunum er LEGOLAND eitt stað, har har næstan 2 mió fólk vitja á hvørjum ári.

Síðani dyrnar lótu upp á fyrsta sinni fyri 43 árum síðani, hava eini 45 mió fólk vitjað her.

Tað serstaka við LEGOLANDI er, at konseptið er útflutt til England, Týskland og sjálvt til USA. Ætlanin er haraftrat at lata eitt LEGOLAND upp í Dubai og í Asien.



**FYRI ØLL**

*LEGOLAND er fyri øll, og her kann ein so sanniliga fáa bæði ein og fleiri dagar at ganga*

## Gist í parkini

**Tað tekur sína tíð at vitja alt tað sum finst í LEGOLAND. Ein dagur er neyvan nóg mikið í so máta.**

**Skipað er tí soleiðis fyri, at fólk kann gista á Hotel LEGOLAND, hagani ein hevur beinleiðis atgongd til parkina.**

**Á hotellinum finst eisini ein hópur av tiltøkum hjá børnunum, har lego-brikkarnir sjálvandi eru partur av undirhaldinum.**

**Hotel LEGOLAND er eitt 4-stjørnu familjuhotel við 199 kømrum, hagani ein eisini hevur gott útsýni yvir LEGOLAND-parkina.**



**2 MIÓ**

*Hvør ár vitja umleið 2 mió fólk úr øllum heiminum í LEGOLANDI. Her eru upplivingar bæði á landi, sjógvi og í luftini*

